## Misnøgdir grønlendingar

Grønlendsku politikararnir Kupik Kleist og Josef Motzfeldt eru alt annað enn fegnir um eitt roknistykki hjá danska professaranum Martin Paldan. Hann hevur sagt, at danski blokkstuðulin til Grønlands má metast um lán, ið grønlendingar hava tikið, og at síðani 1950 er hetta lánið komið upp í 130 mia. krónur. Kupik Kleist og Josef Motzfeldt siga, at professarin hevur gloymt at mótrokna ágóðan, sum danir hava fingið burtur úr Grønlandi hesi 55 árini.



## Ferðamenn við Norrønu bóðu um friðskjól

Tveir ferðamenn, sum komu til Íslands við Norrønu í gjár, hava søkt um friðskjól í Íslandi. Ein palestini og ein sýrialendingur høvdu einki samleikaprógv, tá teir komu í land av Norrønu á Seydisfirði í gjár, og tá teir fingu at vita, at teir skuldu vísast av landinum, valdu teir at biðja um friðskjól í Íslandi, skrivar Morgunblaðið. Útlendingastovnurin í Reykjavík hevur nú málið, og hann skal gera av, um menninir verða vístir úr Íslandi, ella um teir fáa friðskjól. Teir báðir menninir eru í tríatiárunum.

# Linari krøv fyri at fáa útlendingar til Føroyar

**Landsstýrismaðurin í innlendismálum er nú sinnaður at linka krøvini til arbeiðsgevarar, sum vilja hava útlendska arbeiðsmegi**

ÚTLENDINGAR Í FØROYUM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Stór mótstøða hevur verið ímóti ætlanini at fáa útlendingar til Føroya, men nú er Jacob Vestergaard til reiðar at linka krøvini fyri at forða fyri, at útlendingar fáa størri rætt í Føroyum enn føroyingar*

- Tað hevur stóran týdning at fáa semju um ætlanin at fáa fleiri útlendingar til Føroyar at arbeiða. So má tað heldur taka eitt sindur longri tíð, áðrenn tað er klárt at fáa útlendska arbeiðsmegi hendavegin.

Tað sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum.

Føroyskt vinnulív skríggjar eftir arbeiðsmegi og fyri at nøkta tørvin, hava arbeiðsgevarar ligið á landsins myndugleikum fyri at fáa teir at gera tað lættari at fáa útlendingar til Føroyar at arbeiða.

Í hesum sambandi hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum gjørt eitt uppskot, sum skal gera tað lættari at fáa ES borgarar til Føroyar at arbeiða.

Lógin skal bæði til viðgerðar í Løgtinginum. Men av tí at talan er um danskt málsøkið, skal málið eisini til viðgerðar í Fólkatinginum.

### Tíðarætlanin fokin

Upprunaliga var ætlanin, at lógin skuldi koma í gildi 1. januar.

Men nú er so langt útlið-ið, at sjálvt landsstýrismaðurin so smátt er farin at ásanna, at tann tíðarætlanin er fokin, ella í øllum førum er hon við at fúka.

Men orsøkin til, at tað gongur so seint, er ikki tann, at landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur ligið á málinum.

- Tað er hálvur annar mánaði síðani, at eg var liðugur við eitt uppskot um eina lóg, sum ger tað lættari at fáa ES borgarar til Føroyar.

Síðani tá hevur uppskotið verið til viðgerðar í politisku skipanini og í samgonguni.

Í samgonguni er tað serliga Javnaðarflokkurin, sum setir seg ímóti, at málið ikki verður fram, sum tað fyriliggur nú.

### Vandi fyri happing

Eftir uppskotinum, sum nú fyriliggur, skulu arbeiðsgevarar, sum fáa útlendingar higar at arbeiða, tryggja teimum minst 30 tíma arbeiðsviku.

Hetta hevur fingið bæði arbeiðarafeløg og Javnaðarflokkin at stúra fyri, at arbeiðsgevarar fara fyrst at biðja útlendingarnar til arbeiðis fyri ikki at bróta lógina, tá ið tað knípur við arbeiði og so má føroyska arbeiðsmegin standa og hyggja at og sutta labbarnar.

Javnaðarflokkurin stúrir fyri, at skulu útlendingar fáa framíhjá rætt framum føroyska arbeiðsmegi til at fáa eina 30 tíma arbeiðsviku, kann tað føra til ófrið á arbeiðsmarknaðinum. Men tað kann eisini føra til, at teir útlendingar, sum koma higar at arbeiða, fara at vera happaðir og forfylgdir.

Tí vil Javnaðarflokkurin ikki uttan víðari taka undir við uppskotinum, sum tað fyriliggur.

### Linka krøvini

Jacob Vestergaard sigur, at samband er ímillum tey ymsu ráðini í landsstýrinum og so seint sum mánadagin var fundur ímillum løgmann og innlendismálaráðið.

- Avbjóðingin er at orða uppskotið so, at allir partar kunnu taka undir við tí, bæði politiskir flokkar og partarnir á arbeiðsmarknaðinum.

- Tað er tað týdningarmesta og so ger tað minni, at tað tekur eitt sindur longri tíð.

Ein stórur ivaspurningur er júst orðingin um, at arbeiðsgevarar skulu tryggja útlendingum, teir fáa higar, eina arbeiðsviku upp á minst 30 tímar

Í eini roynd at finna eina semju, er Jacob Vestergaard nú eisini sinnaður at tosa um at sleppa kravinum um at tryggja útlendingum í Føroyum minst 30 tíma arbeiðsviku.

- Ein møguleiki er at sleppa kravinum um 30 tíma arbeiðsviku, so at einasta treyt fyri at fáa útlendingar higar, er, at teir hava tilboð um arbeiði.

Hinvegin staðfestir Jacob Vestergaard, at eitt krav, sum ikki verður slept, er, at útlendingar, sum koma higar, skulu arbeiða eftir føroyskum sáttmálum og fyri føroyska løn.

Í Danmark og øðrum norðanlondum, hava nógvar søgur verið um, hvussu grovliga arbeiðsgevarar hava misbrúkt útlendska arbeiðsmegi, helst úr Eysturevropa við at dumpa lønirnar og við at geva teimum bústaðir, sum eru undir alt mark.

Men hesum stúrir Jacob Vestergaard ikki so illa fyri í Føroyum.

- Okkara samfelag er so lítið, at vit eiga at kunna byrgja upp fyri sosialari dumping, sigur landsstýrismaðurin.

Hann leggur afturat, at í hesum sambandi arbeiðir landsstýrið eisini við at gera eina eftirlitsskipan, sum skal ansa eftir, at arbeiðsgevarar ikki dumpa lønirnar hjá teimum útlendingum, sum koma higar at arbeiða.

Júst spurningurin um sosiala dumping og framíhjárættindi til 30 tíma arbeiðsviku, hava verið høvuðsorsøkin til, at arbeiðarafeløgini hava sett føtur í spenni ímóti, at ætlanin varð sett í verk.

Hinvegin er tað óhugsandi, at útlendingar koma higar at arbeiða, men enda við at fáa almannahjálp, skuldi tað verðið ov lítið av arbeiði.

- Í somu løtu, teir ikki hava arbeiði, er grundarlagið fyri uppihaldsloyvinum burturdottið og so mugu teir fara av aftur landinum, sigur Jacob Vestergaard.

Tí hevur Jacob Vestergaard framvegis eina vón um, tað fer at eydnast at seta ætlanina í verk. Men nær tað verður, fær hann so onki sagt um enn.

Les eisini greinina: Javnaðarflokkurin tríggjar spurningar um útlendingar

# Javnaðarflokkurin tríggjar spurningar um útlendingar

ÚTLENDINGAR Í FØROYUM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Enn er óvist, nær uppskotið um at gera tað lættari hjá ES borgarum at koma til Føroyar, verður sett í verk.

Eitt uppskot er liðugt, men í samgonguni eru tað serliga Javnaðarflokkurin, sum hevur sett seg ímóti, at tað verður sett í verk, sum tað fyriliggur nú.

Í Løgtinginum nú ein dagin staðfesti Løgmaður, at Javnaðarflokkurin ikki uttan víðari vil góðtaka uppskotið hjá landsstýrismanninum í innlendismálum um at gera tað lættari hjá ES borgarum at koma til Føroyar at arbeiða.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður og formaður Javnaðarfloksins, segði í Løgtinginum, at Javnaðarflokkurin hevur sett tríggjar spurningar fram og teir eru hesir:

1: Hvat eftirlit hava vit við útlendingar, sum koma higar at arbeiða og teirra arbeiðsgevarum?

2: Hvørjar upplýsingar geva vit útlendingum, sum koma til Føroya at arbeiða?

3: Skulu útlendingar, sum koma higar at arbeiða, hava framíhjá rætt til eitt ávíst tímatal um vikuna framum føroyska arbeiðsmegi?

- Hetta eru viðkomandi spurningar og eg haldi, at innlendismálaráðið skal syrgja fyri at geva okkum svar upp á teir, segði Jóannes Eidesgaard.

Eisini Hendrik Old, formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum skilti ikki rættiliga, hví fiskivinnan gramdi seg so illa um trot á arbeiðsmegi.

- Tað er eitt stutt tíðarskeið upp á tveir mánaðir um várið, tá ið nógv fiskarí er, at tað kann vera trot á arbeiðsmegi. Allar aðrar tíðir á árinum, er støðan heilt hampilig.

- Vit hava smá viðurskifti og vit skulu helst ikki koma í ta støðu, at vit hava eini 20-30 útlendingar í eini bygd, sum hava trygd fyri eini arbeiðsviku upp á 30 tímar, samstundis sum alt bygdarfólkið má ganga hendur í lumma, tí arbeiðsgevarin skúgvar tey afturum fyri at halda lógina.

- Tað fer at ganga útyvir teir útlendingar, sum koma higar at arbeiða, vissi teir skulu hava framíhjá rætt til teir tímarnar, sum eru á einum flakavirki, segði Hendrik Old.

Annars skilti hann heldur ikki trupulleikan við handverkarum, tí vit hava havt óteljandi útlendskar handverkarar í Føroyum og tað hevur ongantíð verið trupulleikar, segði hann.

Les eisini greinina: Linari krøv fyri at fáa útlendingar til Føroyar.